## Kapitalisma bjargaði laksinum



Í seinastu útgávu av amerikanska figgjartíðarritinum Fobes er grein úr Íslandi, har blaðið er á laksaveiði í Aðaldali við kenda laksamanninum Orra Vigfússyni. Í greinini verður Orri umrøddur sum maðurin, ið fremstur av øllum bjargaði laksinum, sum hann eisini varð heiðraður fyri í fjør. Forbes lýsir Orra sum ein nútímans handilsmann, sum við at brúka meginreglurnar í kapitalismuni hevur bjargað villa laksinum í Norðuratlantshavi.

## Grandi byggir út

Í síðstu viku var borgarafundur í Vopnafirði í Íslandi, og har fingu fólk at vita, at stóra fyritøkan Grandi ætlar at byggja nýtt fiskamjølvirki á staðnum. Felagið hevur virki á Vopnafirði, men tað skal byggjast út og nútímansgerast, skrivar Morgunblaðið. Á fundinum kom millum annað fram, at virkið skal hava goymslu til 10.000 tons av fiskamjøli. Verður ætlanin veruleiki, byrjar arbeiðið nú í vár og verður eftir ætlanini liðugt í mai næsta ár.

# Keyparar hokna Un



**Stóra íbúðarbyggingin Undir Gráasteini er dýrkað 10-20 milliónir krónur. Byggiharrin KJ Contractors hevur endaliga givið skarvin yvir og Føroya Banki, sum hevur yvirtikið projektið, roynir nú at skumpa meirkostnaðin yvir á keypararnar, sum í gjárkvøldið fingu eykarokningar fyri upp til 255.000 krónur í part. Óvitandi og ørkymlaðu keyparnir kenna seg snýttar og mótmæla viðferðini**

**BYGGING**
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Álvarsom og ørkymlað andlitsbrá á Hotel Føroyum í gjárkvøldi. Eitt bræv hevur stungið enn ein kíla inn í dreymin hjá eini 300 fólkum, sum hava sett sína framtíð í spildurnýggju íbúðirnar Undir Gráasteini í Havn. Eitt bræv, har tey verða biðin um at møta til fundar fyri at verða kunnað um tíðandi viðurskifti í byggingini av teirra íbúðum Undir Gráasteini. Hvørki meira ella minni.

Tey minnast aftur á fjørsummar, tá byggiharrin Kristin Johansen og hansara smápartafelag KJ Contractors tveitti handklæðið í ringin eftir at hava mist tamarhaldið á risastóru byggingini, ið fevnir um átta íbúðarblokkar við 12 íbúðum hvør, og sum er mett at kosta 150-200 milliónir krónur. Tá tók Føroya Banki yvir, setti nýggja leiðslu at standa fyri byggingini og Christian Andreasen, advokat, at halda skil á. Umskipanin skuldi tó

## FAKTA

Farið varð undir verkætlanina Undir Gráasteini í juni 2006, tá økið varð grivið út og planerað. Tilsamans skulu byggjast átta íbúðarblokkar við 12 íbúðum hvør. Tilsamans koma eini 300 fólk at búgva í nýggja býlinginum. Fyrsti blokkurin varð liðugur fyri jól, og sambært upprunaligu ætlanini skuldu tey síðstu flyta inn síðst í hesum árinum. Komandi mánaðin skal Articon, sum er biðið um at taka við projektleiðsluni, finna útav, hvussu skjótt arbeiðið kann gerast liðugt. Byggiharrin, KJ Contractors, fer á húsagang, men eitt dóttirfelag hjá felagnum, Sp/f Íbúðir Undir Gráasteini, skal gera arbeiðið liðugt. Føroya Banki fíggjar ætlanina, sum er mett til 150-200 milliónir krónur.

